# Ferðslulógin endurskoðast

**Ferðslulógin er ikki nóg góð og tí verður í løtuni arbeitt við at gera eina heilt nýggja lóg, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður. Millum annað skal parturin um treytaða frádøming av koyrikortinum, tá ein hevur koyrt ov skjótt, endurskoðast.**

FERÐSLA
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, metir ikki, at ferðslulógin virkar nóg væl. Eitt dømi um hetta eru ferðamátingarnar hjá Landsverkfrøðinginum, sum vísa, at tveir av trimum bilum í Streymoynni koyra skjótari enn 80 km/t á landsvegi, og at annar hvør bilur í Eysturoynni ger tað sama.

Landsstýrismaðurin heldur tvær orsøkir vera til at fólk koyra ov skjótt. Fyri tað fyrsta verður ferðslulógin av mongum mett at vera meira rúmlig enn gamla lógin, serliga ásetingarnar um treytaða frádøming av koyrikortinum, tá koyrt verður ov skjótt.



*Bjarni Djurholm er farin í holt við at gera eina heilt nýggja ferðslulóg. Galdandi lóg er á fleiri økjum ikki nóg góð, heldur landsstýrismaðurin sum væntar, at ein nýggj lóg er liðug um eitt ár ella so.*

Harumframt avspeglar ferðin á búskapinum, hvussu fólk koyra, og tá tað gongur væl í samfelagnum, keypa fólk nýggjar bilar, alt skal ganga skjótt og ferðin handan rórið økist eisini, vísir Bjarni Djurholm á.

## Nýggja ferðslulóg

Bjarni Djurholm metir ikki, at ferðslulógin, við teimum broytingum sum komu í gildi 1.juli 2000, er nóg góð. Tí verður í Vinnumálaráðnum arbeitt við at smíðja eina heilt nýggja ferðslulóg, sum eftir ætlan skal vera liðug um eitt ár ella so. Ein arbeiðsbólkur við fakfólki er settur og eisini er ein fulltrúi í Vinnumálaráðnum settur at taka sær av arbeiðinum burturav.

Ein broyting, sum landsstýrismaðurin kundið hugsað sær at fingið við í nýggju lógina, er at mest loyvda ferð á landsvegi og bygdum øki ikki verður ávíkavist 80 km/t og 50 km/t allastaðni, men at atlit verða tikin at umstøðunum, so t.d. verður loyvt at koyra 90 km/t á summum økjum, meðan mest loyvda ferð verður lægri aðrastaðni.

– Í dag eru vegirnir so góðir, at væl hevði borið til at koyrt 90 km/t á summum strekkjum á landsvegnum, og eisini eru summir vegir, t.d. í høvuðsstaðnum, so góðir, at hámarksferðin kundi verið 60 km/t. Harafturímóti er væl hugsandi, at ferðin átti at verið lægri á øðrum strekkjum, bæði á landsvegi og í bygdum øki, sigur Bjarni Djurholm.

Hóast landsstýrismaðurin longu við galdandi lóg hevur heimild at áseta eina hægri hámarksferð enn tær, sum eru galdandi í dag, hevur Bjarni Djurholm ikki hug at gera broytingar beinan vegin. Hann vísir á, at fyrst skulu metingar gerast av, hvar ferðin møguliga kann setast upp, og í sama viðfangi skal eisini hyggjast at, hvar mest loyvda ferð møguliga eigur at lækkast. Landsstýrismaðurin kundi ímynda sær, at mest loyvda ferð á ymsum strekkjum fyrst varð broytt í eini royndartíð, møguliga næsta summar. Men at hava ymiskar (differentieraðar) hámarksferðir er avgjørt nakað, sum verður tikið við í eini nýggjari ferðslulóg, sigur Bjarni Djurholm.

– Høvuðsendamálið við at gera eina nýggja ferðslulóg er at økja um ferðslutrygdina, so vit avmarka talið av skaddum og deyðum í ferðsluni so nógv sum gjørligt. Eisini er neyðugt at vit fáa eina lóg, sum er sambærlig við ferðslulógirnar í okkara grannalondum, sigur Bjarni Djurholm og vísir á, at galdandi ferðslulóg er ein gomul lóg, einans við nøkrum broytingum og dagføringum.

## Treytaða frádømingin endurskoðast

Bjarni Djurholm kundi hugsað sær, at parturin um treytaða frádøming av koyrikorti, tá ein hevur koyrt ov skjótt, verður herdur. Eftir galdandi lóg missir ein persónur koyrikortið treytað í trý ár, koyrir viðkomandi meira ein 30 km/t skjótari enn hámarksferðina, umframt at hann ella hon skal upp til nýggja koyriroynd. Hetta er galdandi, óansæð hvussu nógv ov skjótt viðkomandi koyrir.

Men hetta eigur, sambært Bjarna Djurholm, at broytast, so tað ikki er líka mikið, hvørt ein koyrir 31 ella kanska 71 km/t ov skjótt. Hann kundi ímynda sær ein leist, sum liggur onkustaðni ímillum ta gomlu lógina, har ein misti koyrikortið beinanvegin, og verandi lóg. Tað vil siga, at lógin varð herd, so at tey sum koyra alt ov skjótt, missa koyrikortið beinanvegin, meðan tey, sum koyra eitt sindur ov skjótt, sleppa við treytaðari frádøming og nýggjari koyriroynd. Hvar markið skal ganga, dugur hann ikki at siga í dag.

– Hetta eru alt spurningar, sum arbeitt verður við í samband við nýggju ferðslulógina, og tí er ov tíðliga at siga, hvat úrslitið verður, sigur Bjarni Djurholm. Hann væntar, at ein nýggj ferðslulóg er klár at leggja fyri løgtingið um eitt ár ella so.




*Spurningurin um treytaða frádøming av koyrikortinum skal takast upp av nýggjum, sigur Bjarni Djurholm, sum eisini kundi hugsað sær, at hámarksferðin varð broytt á summum strekkjum.*



# Klaksvíkar Klubbi letur upp aftur leygardagin

**Eftir umfatandi umvælingar letur Klaksvíkar Klubbi nú uppaftur. Leygardagin verður móttøka í nýumvældu hølunum. Jan Gardar, sum skal samskipa dansitiltøk og annað sigur, at í fyrstu atløgu fara tey at leggja seg eftir at hava opið hóskvøld til sunnukvøld**

UMVÆLING
*Solby A. Eliasen*

Klaksvík:
Tað fyrsta ein hugsar, tá ein kemur inn í dansihølið í neðra í Klaksvíkar Klubba er, at hetta ikki kunnu verða somu høli, sum ein var inni í fyri umleið tveimum mánaðum síðani.

Tá sóu hølini ikki gott út. Tey vóru niðurslitin og lítið tiltalandi hjá fólki at koma inní. Ongin barr var tá, bert eitt lítið skapilsi av eini barr, sum var sett saman av einum hálvveggi og nøkrum hvítum hillum. Haraftur at var ongin pallur til orkestur ella plátuvendara.

Nú eru hølini hamskift. Ein avbera flott, myrkt mahogni barr er sett upp og ein pallur er eisini gjørdur. Framvið tí eina vegginum stendur ein lang sofa við lítlum rundum borðum frammanfyri og stólar eisini. Veggirnir eru málaðir myrkt reyðir og tey áður so slitnu gólvini við einum ótali av brennimerkjum eru nú skift út við kirsuberjalittar gólvplátur. Eisini eru ljósviðurskiftini munandi broytt. Tað sum áður var at meta við lítlar køkslampur uppi yvir borðunum eru nú vorðin til smáar ”spottarar” í loftinum. Nakað sum gevur hølunum ein sera hugnaligan dám. Jú, sanniliga eru dansihølini í Klaksvíkar Klubba vorðin til eini avbera flott høli, har ein kann hugna sær, um ein fer út okkurt kvøldið.

Í erva eru broytingar eisini framdar, men ikki so umfatandi sum í neðra. Tað, sum vanliga verða nevnt Norðpólurin hevur fingið nýggjar møblar og ein umgang av hart tiltrongdari máling. Eisini hølið í erva, har barrin er, hevur fingið onkrar smávegis umvælingar, millum annað er teppið, sum var har fyrr nú eisini skift út við kirsjuberjalittar plátur.

Áðrenn vóru pool- og billiardborðini í neðra, men tey eru so flutt upp á nú.



*Myndatekstur til Jan og Sonhard: Bæði Jan Gardar og Sonhard Johannesen vóna og vænta, at nógv fólk fara at koma í klubban, sum nú er vorðin sera snøggur eftir umvælingarnar*

## Strangari eftirlit

Sonhard Johannesen, formaður í Klaksvíkar Klubba og Jan Gardar eru týðuliga ernir av klubbanum, sum hann sær út nú. Teir siga, at teir eru sera spentir upp á at lata uppaftur og síggja, hvussu fólk fara at taka undir við teimum tiltøkunum, sum koma at verða í Klubbaum framyvir.

Sonhard sigur, at eftirlitið nú verður munandi strangari.

– Ja, tað kanst tú ætla, at tað verður strangari. Nú eru hølini blivin so flott og sjálvandi ganga vit útfrá, at fólk fara væl um, men fyri tað verður strangt eftirlit kortini. Ongin óhøviskur atburður verður góðtikin. Viðkomandi, sum ikki dugir at uppføra seg, verður stutt sagt tveittur á dyr, sigur formaðurin avgjørdur á málinum.

Tað verður Jan Gardar, sum fer at samskipa tey tiltøkini, sum skulu verða í Klaksvíkar Klubba.

– Í fyrstu atløgu fara vit at skipa fyri dansi fríggjakvøld og leygarkvøld. Og so verður tað eisini opið sunnudag, sjálvandi, greiðir Jan frá og leggur aftur at, at hann umhugsar eisini at fara at royna at gera hóskvøld til eitt kvøld, har fólk kunnu støkka inn á gólvið og hugna sær eina løtu.

Hann sigur eisini, at hann umhugsar møguleikarnar fyri at skipa fyri øðrum tiltøkum eisini, men enn er onki ítøkiligt á skránni.

## Dansurin skal fíggja

Sonhard sigur, at tað eru 212 limir í Klaksvíkar Klubba, sum gjalda árligt limagjald. Men tað er ikki tað, sum fíggjar klubban.

– Dansurin kemur at fíggja klubban, greiðir hann frá. Hann sigur, at áðrenn farið var í holt við umvælingarnar, var tað so, at tað mól runt fíggjarliga, men hann vónar, at tað nú fer at verða betri undirtøka millum fólk at koma í klubban.

– Vit fóru undir hetta eftir ynski frá limum og fólki annars, sum komu her javnan, so gangast má út frá, at undirtøkan fer at verða góð nú hølini eru vorðin so snøgg.

Bæði Sonhard og Jan halda, at hetta er ein góð tíð at lata uppaftur. Tí tey myrku kvøldini fara at koma aftur nú og summarið er farið, so væntast kann, at fólk fara at koma meiri út aftur nú um vikuskiftini.

Sonhard vísir á, at henda umvælingin eisini hevur stóran týdning frameftir, um hugsað verður um ætlaða undirsjóvartunnilin undir Leirvíksfjørð.

– Vit eru klárir til at taka ímóti eysturoyingum, tá undirsjóvartunnilin einaferð er komin – um hann kemur. Tað kann meiri enn so vera, at tað eru fleiri eysturoyingar, sum fara at koma hendavegin eitt vikuskiftiskvøld heldur enn at fara til Havnar, heldur hann.

Jan Gardar kemur sum sagt at verða hann, sum skipar fyri, at tað verða tiltøk at fara til í Klaksvíkar Klubba framyvir. Hann hevði ábyrgdina av ungdómsdiskotekinum, Lognbrá, í átta ár, tann tíð tað var. Har er nú virksemi byrjað aftur, men tað er ikki Jan, sum nú tekur sær av tí. Jan sigur, at tað kann ikki samanlíknast at hava eitt ungdómsdiskotek og so klubban.

- Tað er stórur munur á teimum báðum, men eg síggi hetta sum eina stóra og spennandi avbjóðing, sigur hann.

Klaksvíkar Klubbi letur sum sagt uppaftur leygardagin. Tað verður móttøka frá klokkan 17 fyri limum og øllum teimum, sum á ein ella annan hátt, hava verið uppi í umvælingararbeiðinum. Frá klokkan 22 um kvøldið verður so opið fyri almenninginum.

# Føroyskur fiskadoktari í Noreg

**Turid Mørkøre, sum ættað er úr Klaksvík, vardi í seinastu viku doktararitgerð um alifisk á norskum landbúnaðarháskúla**

DOKTARARITGERÐ

Seinasta fríggjadag vardi Turid Mørkøre, sum er ættað úr Klaksvík, doktararitgerð við landbúnaðarháskúlan í Ås í Noreg.

Heitið á ritgerðini var »Fettinnhold og produktutbytte i laksefisk«. Ritgerðin er grundað á kanning, Turid Mørkøre hevur gjørt av millum øðrum føroykum alifiski.

Mett verður, at kanningarnar, sum doktararitgerðin er grundað á, kunnu fara at fáa stóran týdning fyri alivinnuna yvirhøvur.

Turid Mørkøre, er 37 ára gomul. Hon las lívfrøði við Århus Universitet, men tók í 1995 kandidatútbúgving við landbúnaðarháskúlan í Ås í Noreg, har evni hennara var húsdjór og alivinna.

Turid Mørkøre hevur arbeitt við Akvaforsk í Ås og millum annað skrivað bók um fóðurlæru. Hon hevur luttikið í fleiri norðurlendskum og europeiskum verkætlanum í samstarvi við ymsar granskingarstovnar.

**ej**

